## Nógv deyð í skalvalopi

Í minsta lagi 19 fólk doyðu, tá ein skalvur leyp ioman yvir eina fjarskotna bygd har norðuri í Pakistan í morgun. Myndugleikarnir søgdu fyrrapartin, at minst 40 fólk vóru ikki komin afturíaftur, og tí stúrdu teir fyri, at skalvalopið hevði kravt meiri enn 19 mannalív. Skalvalopið hevði samstundis avbyrgt bygdina, og teir lokalu myndugleikarnir bóðu fyrrapartin um gravimaskinur at rudda kavan burtur og tyrlur, sum kunnu flyta fólkið burtur. Tað hevur kavað illa har norðuri í Pakistan teir seinastu dagarnar, og nógvir vegir eru stongdir, skrivar AP.



# Annika positiv um Grønu Oynna

**- Eg eri sannførd um, at Nólsoyarverkætlanin kann verða fyrimynd fyri útbygging av grønum orkuloysnum frameftir, bæði her heima og aðrastaðni, og tí er egnað sum ítøkiligt dømi um ein burðardyggan orkupolitikk, sum gongur hond í hond við við ein virknan veðurlagspolitikk, segði Annika Olsen, landsstýriskvinna, í svari upp á fyrispurning frá Bjarna Djurholm**



*Annika Olsen er positiv mótvegis Nólsoyarverkætlanini, men tvíbýtið innan orkumálini ger tað trupult at arbeiða við slíkum verkætlanum*

GRØN OYGGJ

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Annika Olsen, landsstýriskvinna við yvirorðnaða orkupolitikkinum, svaraði í gjár fyrispurningi frá Bjarna Djurholm um Nólsoyarverkætlanina.

Hon segði undir tí orðaskifti, ið stóðst av fyrispurninginum, at tað er sera óheppi, at orkumál er tvíbýtt millum Innlendismálaráðið og Vinnumálaráðið, tí meðan hon sjálv umsitur yvirorðnaða orkupolitikkin, so liggur orkuframleiðsla – eitt nú SEV – undir Vinnumálaráðnum.

Men Annika Olsen var positiv um verkætlanina.

Nólsoyarverkætlanin, hvørs upprunaliga endamál var at brúka vindorku til bæði el, hita og vetni, so at oyggin kundi gerast púra leys av olju, eisini í samferðsluni inn til Havnar, var bæði framsøkin og tøkniliga slóðbrótandi, segði Annika Olsen í svari sínum.

Landsstýriskvinnan greiddi frá, at arbeitt verður framvegis við einari verkætlan á privatum stigi, sum kortini ikki er eins ambitiøs og upprunaliga verkætlanin.

Verkætlanin gevur tó framvegis ríkar møguleikar at minka um oljunýtsluna í oynni við at brúka vindorku til upphitan av vatni, sum so kann verða brúkt í einari fjarhitaskipan, segði Annika Olsen.

Veðurlagspolitikkur Føroya mælir til at útbyggja fjarhitaskipanir, so oljunýtslan til upphiting kann skerjast munandi.

Tí meti eg, at Nólsoyarverkætlanin framvegis er ein dygdargóð verkætlan, hvørs aðalmál stuðlar undir veðurlagspolitikk Føroya um at skerja útlátið av veðurlagsgassum, segði Annika Olsen.

Landsstýriskvinnan vísti á, at Innlendismálaráðið ikki eru beinleiðis knýtt at verkætlanini, tí tað er fyrst og fremst Jarðfrøði, ið er stovnur undir Vinnumálaráðnum, sum hevur verið knýtt at og leitt ætlanina. Tí helt hon, at spurningurin í veruleikanum átti at verði settur Jóhan Dahl, vinnumálaráðharra.

Viðvíkjandi spurninginum um at mæla til at seta pening av til verkætlanina segði Annika Olsen, at Innlendismálaráðið bert hevur fýra milliónir krónur at ráða yvir til stuðul til slíkar verkætlanir, og tað munar einki í førinum Nólsoyarverkætlanin.

Men tá spurt verður, um landsstýriskvinnan metir verkætlanina kunna verða eina fyrimynd fyri burðardyggan orkupolitikk, er hon meiri bjartskygd.

- Eg eri sannførd um, at Nólsoyarverkætlanin kann verða fyrimynd fyri útbygging av grønum orkuloysnum frameftir, bæði her heima og aðrastaðni, og tí er egnað sum ítøkiligt dømi um ein burðardyggan orkupolitikk, sum gongur hond í hond við við ein virknan veðurlagspolitikk, segði Annika Olsen.

Hon dugir kortini ikki at meta um, hvørt júst Nólsoyarverkætlanin kann profilera Føroyar í alheims høpi.

Við tí menning, vit síggja her heima og úti í heimi innan varandi orkukeldur, so er kappingin hørð. Men jú fleiri verkætlanir verða framdar, tess meira hava Føroyar at vísa á úti í heimi, segði Annika Olsen.

## Fyrispurningurin

Hvørjar møguleikar sær landsstýriskvinnan í Nólsoyarverkætlanini?

Ætlar landsstýriskvinnan at arbeiða víðari við ætlanini, og hvørji stig verða so tikin?

Fer landsstýriskvinnan at mæla til, at peningur verður settur av til verkætlanina, so hon gerst veruleiki?

Metir landsstýriskvinnan, at verkætlanin kann verða fyrimynd fyri burðardyggan orkupolitikk, sum kann profilera Føroyar í alheims høpi?

# Krabbameinsætlan væl móttikin

**Tað vóru positivir tónar frá øllum flokkum, tá krabbameinsætlanin hjá Heilsumálaráðnum var til aðalorðaskifti í Tinginum í gjár**

KRABBAMEINSÆTLAN

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Heilsumálaráðharrin, Aksel V. Johannesen, legði í gjár eina umfatandi krabbameinsætlan fyri Tingið til aðalorðaskifti. Ætlanin er í 58 tilmælum og skal fremjast komandi trý árini.

Ætlanin er í fimm punktum. Talan er um fyribyrging, sjúklingagongd, skreening, endurmenning og at enda gransking. Tað eru 58 tilmælir og í tí stóra kunnu vit siga, at tað, ið verður lagt upp til, er, at sjúklingurin fær eina heildartilgongd beinanvegin, hann hevur staðfest krabbamein. Hvat sjúklingagongdin verður og hvørjar viðgerðir hann skal ígjøgnum, sigur Aksel V. Johannesen.

Hetta er galdandi heilt frá staðfesting av sjúkuni fram til endurmenningina.

Aðalorðaskiftið vardi í fýra tímar, og Aksel V. Johannesen var væl nøgdur við tað, hann hoyrdi.

- Eg haldi, at Tingið hevur tikið væl ímóti krabbameinsætlanini, og framsøgufólkini vóru væl fyrireikað og høvdu sett seg væl inn í málið. Tey vóru eisini øll positiv, sigur Aksel V. Johannesen.

Spurningurin, sum hekk í luftini, var, hvussu hendan ætlanin skuldi fíggjast, skuldu øll 58 tilmælini setast í verk innan 2012. Og hvussu er so ætlanin at fíggja tær 27 milliónirnar í íløgum og tær um 20 milliónirnar í rakstri, sum ætlanin kostar.

### Góðar vónir

- Tá tosað verður um 27 milliónir í íløgur, so tosa vit um ein nýggjan CT-skannara, ein nýggjan MR-skannara og ein nýggjan mammograf. Pengar eru settir av á fíggjarlógini fyri 2010 til ein nýggjan CT-skannara, sum verður keyptur í leypi av várinum, og so er ætlanin at seta pening av til ein MR-skannara í 2011 og ein mammograf í 2012, sigur Aksel V. Johannesen.

Tá tað kemur til rakstur, fer hann at økjast við einum 20 milliónum krónum hesi trý árini, krabbameinsætlanin varar.

- Men eini 35-40 av tilmælunum kosta einki at seta í verk, og tey verða eisini sett í verk beinanvegin. So eru tað nøkur, sum kosta heilt lítið, kanska eitt stað millum 30.000 og 100.000 krónur, og tey verða eisini sett í verk innanfyri verandi fíggjarkarm hjá Heilsumálaráðnum, sigur Aksel V. Johannesen.

So eru tað nøkur tilmæli, sum kosta meira, og tá verður neyðugt at hækka karmin til Heilsumálaráðið, skulu tey tilmælini setast í verk.

- Tað arbeiði eg so miðvíst fram ímóti, og eftir aðalorðaskiftið, havi eg góðar vónir um, at tað fer at eydnast, sigur Aksel V. Johannesen, landsstýrismaður í Heilsumálum.